Minnir okkum á okkara egnu avmarkingar

– Lat hetta teska okkum í oyrað, at vit eiga at fáa so nógv positivt og lívsjáttandi burturúr tí evarsku lítlu tíð, okkum er avmáld, segði løgmaður, tá ið hann avdúka eina stóra standmynd á Tvøroyri

AVDÚKING
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Síðani Palli Julsgart á Tvøroyri fyri nøkrum árum síðani fór undir listaskálan, Oynna, á Tvøroyri, hevur hann veruliga gjørt vart við seg við framsýningum av ymsum slagi.

Hann hevur eisini gjørt vart við seg sum listamann. Ikki minst hevur hann gjørt vart við seg við nøkrum stórum standmyndum á Tvøroyri.

Sunnudagin læðaði hann enn ein stein afturat tí varða, hann fer at seta eftir seg, tí tá var aftur ein stór standmynd, sum hann hevur gjørt, avdúkað.

Og tað fór ikki stillisliga aftur við borðinum, tá ið standmyndin varð avdúkað á parkeringsøkinum á Tanganum á Tvøroyri hendan hendinga góðveðursdagin.

Teir tríggir, Eyðun Nolsøe, og brøðurnir Tróndur og Brandur Enni spældu og sungur og kirkjukórið Ljómur sang eisini.

Standmyndin hevur fingið heitið "Frælsi" og tað var sjálvur løgmaður sum fekk heiðurin av avdúka standmyndina, sum er ein høg súla av stabbagróti úr Froðba, við tveimum svartbakum á.

– Hetta er ein standmynd av nøkrum, sum vit hava sæð hvønn Guðs skapta dag - ein standmynd av okkara egna heimaumhvørvi – av okkara egnu oyggj – av okkara egna landi, segði løgmaður.

Sermerkta stabbagrótið, sum sæst nógva staðni í Suðuroy, er partur av niðastu og elstu jarðfrøini á landi í Føroyum. Hesar basaltfláir, sum vit síggja so týðiliga eitt nú úti í Froðba og í Hovi, siga okkum sína egnu søgu um, hvussu Føroyar vórðu til úr ovurstórum og ógvisligum eldgosum fyri umleið 60 milliónum árum síðan.

Minnir okkum á okkara egnu avmarkingar

Løgmaður helt, at ein standmynd má hava ein boðskap – hon má vilja okkum okkurt.

– *Hvat kann so ein slík standmynd seta í gongd í okkara hugarensli?*

Hann segði, at umframt at hon er vøkur í sær sjálvum, kann hon í fyrra lagi siga eitt sindur um, hvussu gamalt okkara land er.

– Men harumframt kann hon við sínum 60 milliónum árum minna okkum á, hvussu ótrúliga stutt okkara æviskeið í grundini er afturímóti øllum rundanum okkum.



Standmyndin er ein høg súla av stabbagróti. Ovast sita tveir svartbakar. Standmyndin eitur Frælsi og á eini plátu við fótin á henni stendur eitt ørindi úr einum kendum sangi hjá Eyðuni Nolsøe

– Tá ið vit eru 80 ella 90 ára gomul, eru vit veruliga gomul, men hesir klettar hava staðið í 60 milliónir ár

– Tað er ikki rættiliga til at fata fyri okkara vanliga skil.

– Vit halda, at Oyrnafjall hoyrir okkara tíð til, og tað ger tað sjálvandi eisini, men Oyrnafjall hevði staðið í milliónir av árum, áðrenn fyrsti føroyingurin fekk eyga á tað. Vit eru bert eitt sandkorn í tíðarinnar søgu hjá bláu gongustjørnuni – jørðini.

– Latið tí hesa standmyndina minna okkum á okkara avmarkingar í tíðarinnar havi, og kanska eisini teska okkum í oyra, at vit eiga at fáa so nógv positivt og lívsjáttandi burturúr tí evarsku lítlu tíð , okkum er avmáld. Og kanska eisini teska, at vit skulu koma hvørjum øðrum meira við og vera minni fordømandi mótvegis hvørjum øðrum, segði løgmaður.

Tað, sum altíð hevur verið og tað, sum kemur og ferð

Ovast á hesu standmynd standa tveir svartbakar, sum eru stoyptir í bronsu. Svartbakurin er okkara størsti másafuglur og er stórsligin at síggja við sínum stóra veingjabreiði.

– Fuglar vóru fyrstu livandi verur, sum vitjaðu okkara klettar, langt áðrenn menniskjan og seyðurin komu.

Løgmaður segði, at standmyndin ímyndar við øðrum orðum tað , sum altíð hevur verið, og tað, sum kemur og fer: Stabbagrótið hevur altíð verið her og fer altíð at vera her, men fuglurin flygur frælsur - fer avstað, men vendir altíð heimaftur til Føroya.

Hann vónaði, at standmyndin kann fáa onkran av okkum, ella onkran forvitnan ferðamann at steðga á og hugtakast og seta sær spurningar at gruna yvir.

Løgmaður vísti annars á tann stóra týdning, sum listaskálin Oyggin hevur havt fyri Suðuroynna og hevur havt stóran týdning marknaðarføringina av Suðuroynni.

Listaframsýningar hava ikki verið vanligar í Suðuroy og tí hevur listaskálin, Oyggin, verið nýskapandi og er vorðin sýnisgluggin í Suðuroyni fyri tiltøkum, sum annars kanska bara høvdu verið í Havn.

– Og tað eiga vit at vera takksom fyri, segði løgmaður.

Kanska kann hendan standmyndin teska okkum í oyrað, at vit skulu koma hvørjum øðrum meira við og vera minni fordømandi mótvegis hvørjum øð rum, segði løgmaður tá ið hann avdúkaði standmyndina í dýrdarveðrinum sunnudagin

Eisini Tvøroyrar Býráð var á blettinum, tá ið standmyndin varð avdúkað. Her handar borgarstjórin, Kristin Michelsen, hm. listamanninum, Palla Julsgart, eina sømdargávu upp á 10.000 krónur

Verður kanska 100.000 krónur dýrari at byggja hús

–Ein arbeiðsbólkur hjá fíggjarmálaráðnum mælir til at nú skulu fólk eisini betala mvg av arbeiðslønum, tá ið tey byggja ella umvæla sethús. Hinvegin skal tað verða bíligari at keypa hvítvørur og onnur húsarhaldstól

HÚSABYGGING
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Nú fer tað kanska at vera væl dýrari at byggja sær hús. Samstundis fer tað eisini at verða væl dýrari at umvæl síni egnu hús.

Orsøkin er, at nú skulu fólk kanska eisini betala mvg av arbeiðslønum til at byggja hús og til at umvæla hús.

Landsstýrið er farið undir eitt rættiliga umfatandi arbeiði at broyta lógirnar um mvg, punktgjøld og øll onnur gjøld til landskassan. Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur sett ein arbeiðsbólk at endurskoða allar lógir, sum hava við mvg og avgjøld at gera.

Endamálið er at gera mvg og punktgjøld meiri brúkaravinarlig, segði landsstýrið, tá ið arbeiðsbólkurin varð settur.

Men av tí, at samgongan ætlar at fremja skattalættar er endamálið við at endurskoða avgjøldini hvørki at fremja lættar ella at útvega landskassanum fleiri inntøkur.

Tí vóru boðini frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum til arbeiðsbólkin, at tilmælini skulu helst verða útreiðsluneutral,

Dýrari at byggja hús

Arbeiðsbólkurin sigur, at Føroyar eiga at halda seg til eitt meirvirðisgjaldslóg við so breiðum avgjaldsgrundarlagi sum gjørligt. Sama avgjald eigur at vera á øllum vørum og tænastum fyri at lætta um umsitingina og undan-tøk eiga í høvuðsheitunum ikki at verða gjørd, tí tey máa støðið undan mvg lógini.

Eitt, sum arbeiðsbólkurin mælir til, er at leggja uppskot fyri Løgtingi sum skjótast um at strika undantakið um, at mvg ikki skal gjaldast av lønum til bygging og umvæling av egnum bústað Men samstundis eiga punktgjøldini á hvítvørum, radiotólum, sjónvarpstólum, lampum og parfumu at verða strikað.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað fer at kosta landskassanum 26 milliónir um árið at strika punktgjøldini á hvítvørum, radiotólum, sjónvarpstólum, lampum og parfumu.

Men samstundis fer tað at geva landskassanum 30 milliónir um árið at mvg nú skal gjaldast av arbeiðslønum til bygging um umvæling avegnum húsum.

50.000 - 100.000 krónur dýrari

Verður hetta tilmælið fylgt, fer tað at gera tað einar 50.000- 100.000 krónur dýrari hjá einum húski at seta føt undir egið borð við at byggja sær síni egnu hús. Samstundis fer tað eisini at verða dýrari at umvæla hús.

Tá ið arbeiðslønir í sambandi við húsabygging um umvæling vórðu fríkiknar fyri mvg, var ein grundgeving, at tað fór at minka um svart arbeiði.

Nú mvg aftur skal leggjast á hetta, stúra eygleiðarar fyri, at tað aftur fer at økja um svart arbeiði, tí nú fer tað at verða 25% dýrari at fáa timburmenn, elektrikarar og rørleggjarar og tí fer trýstið á fólk um at arbeiða svart at veksa munandi.

Endamálið var eisini at hjálpa sethúsaeigarum við at lækka kostnaðarstøðið og soleiðis seta gongd aftur á virksemið í landinum.

Arbeiðsbólkurin sigur, at hetta undantakið hevur verið sera trupult at umsitið, bæði fyri vinnu og umsiting.

– Vinnan hevur fleiri ferðir víst á hesar trupulleikar. Undantakið skapar eisini nógvar skeivleikar, tí tað fevnir bert um privatar húsaeigarar.

Tey, sum selja hús, duga illa at meta um, hvørja ávirkan tað fer at fáa, um tað nú verður dýrari at byggja hús.

Tá ið fólk skulu seta búgva, viga tey fyri og ímóti, hvat loysir seg best, at byggja ella at keypa eini gomul hús.

Fer tað at dýrka at byggja hús, kann tað hugsast at økja eftirspurningin eftir gomlum húsum, sum sostatt kanska eisini fara at dýrka. Tað kann eisini gera sítttil, at varðveita prísstøðið á gomlum húsum so at tey í hvussu so er ikki fella í virði.

Tey, sum hava ans fyri slíkum viðurskiftum ivast kortini í, um tað fer at síggjast so nógv aftur í prísinum, at punktgjøld á hvítvørum, radio-og sjonvarpstólum o.s.fr., skulu lække.

Keldur, sum kenna til brúkaraviðurskifti siga, at øll handilsfólk skulu ikki skerast yvir ein kamb, men tað er mangan so, at tá ið avhjøld lække, so lække prísirnir ikki heilt so nógv sum avgjaldið lækkar.

Tvørturímóti brúka handilsfólk hetta høvi til at seta vinningin eitt sindur upp, so at avgjaldið bara lækkar eitt sindur.

Hetta ger seg serliga galdandi, har lítil kapping er.

Men har kappingin er hørð, eitt nú ímillum tey, sum selja hvítvørur og radio- og sjónvarpstól, er størri møguleiki fyri, at avgjaldslækkingar koma at sláa fult ígjøgnum- men trygd er ongin.

Ongin avgerð tikin

Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, leggur dent á, at ongin avgerð er tikin um at broyta mvg og onnur avgjøld, soleiðis sum arbeiðsbólkurin hevur mælt til

EINFALDARI AVGJØLD
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo



– Fyrimunir og vansar skulu vigast upp ímóti hvørjum øðrum, sigur Bárður Nielsen

Tað er ongin avgerð tikin enn um, hvussu mvg og onnur avgjøld skulu broytast.

Tað leggur Bárður Nielsen dent á.

Hann sigur, at sostatt er heldur ongin avgerð tikin um at mvg skal gjaldast av arbeiðslønum í samband við at byggja og umvæla sethús.

Hann sigur, at talan er bara um eitt ógvuliga umfatandi og nágreiniligt arbeiði, sum ein arbeiðsbólkur hevur lagt úr hondum við tí fyri eyga at gera mvg og avgjøld einfaldari at umsita, rímiligari og meiri tíðarhóskandi.

Úrslitið hjá arbeiðsbólkinum skal nú til hoyringar hjá nógvum ymsum feløgum, felagsskapum, bólkum og øðrum áhugamálum.

Tá ið tey hava svarað, verður alt savnað saman og so verður málið tikið upp til politiska viðgerð í samgonguni.

Fyrrenn tann viðgerðin er liðug, er ómøguligt at siga nakað um, hvat úrslitið verður, men tað skulu allir vansar og allir fyrmunir vigast upp ímóti hvørjum øðrum, áðrenn støða verður tikin, sigur hann.